UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Sands Kommuna

215 Sandur

Tórshavn, tann 17. mars 2023
J. nr.: 22/13743-17
Viðgjørt: JND
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Viðvíkjandi broytingum í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu**

Sands kommuna hevur í skrivi, dagfest 7. juli 2022, sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum (nú Umhvørvismálaráðið) til góðkenningar 1) uppskot til broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu 2019 – 2025 og 2) uppskot til broytingar í serstøku byggisamtyktini fyri útstykkingina við Hamralið.

Broytingin í serstøku byggisamtyktini er áður góðkend av Umhvørvismálaráðnum, sum fráboðað við skrivi til Sands kommunu dagfest 13. februar 2023. Í sama skrivi fráboðaði Umhvørvismálaráðið eina treytaða góðkenning av broytingum í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu. Talan var um fylgjandi broytingar:

1. matr.nr. 252a "á Grátinum" verður broyttur frá B øki (almennir stovnar) til A øki (sethúsaøki)
2. matr.nr. 316b, vestanfyri veg m, verður broyttur frá B øki (almennir stovnar) til A øki (sethúsaøki)
3. partur, umleið 600 m$^2$, av matr.nr. 181a, í Koytubø verður broyttur frá F øki (landbúnaður) til A øki (sethúsaøki)
4. partur, umleið 11.125m2, av matr.nr. 169a "Inni í vika" verður broyttur frá J øki (tjalding og húsvognar) til Ð øki (vinnuøki)
5. partur, umleið 2.760 m2, av matr.nr. 220a verður broyttur frá F øki (landbúnaður) til B øki (almennir stovnar)
6. partur, umleið 16.760 m2, av matr.nr. 63a "Trøð á Nýlendinum" verður broyttur frá F øki (landbúnaður) til A øki (sethúsaøki)
7. partur, umleið 1.660 m2, av matr.nr. 175a "í Trøðum" verður broyttur frá F øki (landbúnaður) til A øki (sethúsaøki)
8. partur, umleið 1.145 m2, av matr.nr. 63a "norðanvert "Bursatrøð" verður broyttur frá F øki (landbúnaður) til I øki (savnsøki)

Sands kommuna hevur upplýst fyri Umhvørvismálaráðnum, at uppskotini til broytingar í almennu byggisamtyktini hava ligið alment frammi frá 1. apríl til 22. apríl 2022. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 16. mai 2022, hevði kommunan móttikið fýra mótmælisskriv viðvíkjandi broytingunum í almennu byggisamtyktini.

Mótmæli komu frá Búnaðarstovuni, Føroya Bóndafelag og frá tilsamans 35 privatum borgarum. Mótmælini snúgva seg serliga um, at landbúnaðarjørð verður broytt til sethúsaøki..

Sambært úrritum úr gerðabókini hjá Sands bygdarráð, sum Sands kommuna hevur sent Umhvørvismálaráðnum, hevur Sands bygdarráð viðgjørt mótmælini og samtykt, ikki at ganga nøkrum av teimum á møti.

Umhvørvismálaráðið lat uppskotið til broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu 2019 - 2025 til ummælis hjá Býarskipanarnevndini tann 23.08.2022. Býarskipanarnevndin viðmælti í skrivi dagfest 15.11.2022, at broytingarnar í pkt. 1, 2, 3, 4, 5 og 8 í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu 2019 – 2025 verða góðkendar.

Býarskipanarnevndin viðmælti í skrivi, dagfest 27.01.2023, at broytingarnar í pkt. 6 og 7 í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu 2019 – 2025 verða góðkendar, vísandi til, at nevndin, sæð frá einum yvirskipaðum býarskipanarligum sjónarhorni, ikki metir nakað verða í vegin fyri at gera broytingarnar, sum lýstar í pkt. 6 og 7.

Í skrivinum til Sands kommunu 13. februar 2023 boðaði Umhvørvismálaráðið frá, at ráðið ætlar at fylgja tilmælinum frá Býarskipanarnevndini og góðkenna broytingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu 2019 – 2025, tó við teirri treyt, at kommunan lýsir nærri, hvussu ætlanin er at skipað vegir og tekniskar leiðingar í sambandi við, at partur av matr. nr. 63a verður broyttur til Øki A – sethúsaøkið.
Hetta hevur Sands kommuna nú gjørt við í telduposti tann 16. mars 2023 at senda Umhvørvismálaráðnum 1) flatmynd, sum vísir vegføring og frárensl til ætlaða sethúsaøkið á matr. 63a umframt útstykkingarætlan og 2) tvørskurð av atkomuveg og leiðingagrøv til sethúsaøkið.

Umhvørvismálaráðið metir, at nýggju upplýsingarnar eru nøktandi, og tískil verður sagt frá, at Umhvørvismálaráðið, við heimild í § 4 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, og samsvarandi tilmæli frá Býarskipanarnevndini, góðkennir broytingina í almennu byggisamtyktini fyri Sands kommunu, sum hendan er lýst omanfyri.

Vegna Umhvørvismálaráðið

Jóannes N. Dalsgaard
fulltrúi